VINNU SÍÐURNAR

Nr. 57 • mikudagur • 23. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tann tigandi kollveltingin

**2. partur**

VINNUBÓKMENTIR

*Finnbogi Ísakson*

Rættilig broyting kom í



viðurskiftini millum stat og búskap í 1979 og 1980, tá fyrst Margaret Thatcher gjørdist forsætisráðharri í Bretlandi og Ronald Reagan síðani forseti í USA. Bæði vóru fyri frælsum marknaðarkreftum og hart ímóti, at staturin legði uppí. Keypmansdóttirin og sjónleikarin úr Hollywood vrakaðu Keynes og hálsfevndu búskaparfrøðingar sum Milton Friedman og Friedrich Hayek. Báðir ásannaðu, at marknaðarkreftirnar høvdu sínar veikleikar. Men teir hildu, at frælsar marknaðarkreftir vóru betur førar fyri enn staturin at fordeila vørur og tænastur, og at royndirnar hjá myndugleikunum at stríðast ímóti veikleikunum hjá marknaðinum skaddu meira, enn tær gagnaðu. Teir tóku hugskotið fram aftur, sum hevði myndað búskaparpolitikkin frá Victoriutíðini fram til krakkið í Wall Street. Staturin skuldi tryggja, at marknaðarkreftirnar ikki vórðu órógvaðar, og syrgja fyri, at vinnulívið fekk best hugsandi trivnaðarmøguleikar.

Tað er framvegis ivasamt, um hetta kundi roknast sum ein nýggj hugsjón, tí Thatcher og Reagan førdu ikki sama búskaparpolitikk í øllum førum. Umsitingin hjá Reagan helt, at skattalætti var besti hátturin at økja framleiðsluna. Thatcher legði dent á ein strangan peningapolitikk – tað var tann sokallaða monetarisman. Felags fyri bæði var, at tey avnoktaðu tann keynesianska politikkin, sum hevði verið førdur í Vesturheiminum síðani kríggið. Heldur enn at seta sær arbeiði til allar hendur og eitt stórtøkið vælferðarsamfelag sum mál, valdi tann nýggi høgrivongurin at basa inflasjónini og minka tær almennu útreiðslurnar. Í staðin fyri blandingsbúskap vildu tey hava ein minimumsstat, har mong virkisøki vórðu privatiserað ella boðin út.

Marknaðarliberalistarnir hildu, at fólk høvdu væntað sær alt ov nógv av statinum í árunum eftir kríggið. Staturin skuldi ikki annað enn linna tær ringastu plágurnar í mannalívinum, og annars skuldi hann skapa karmar, sum vinna og samfelag kundu virka innanfyri. Væferðarsamfelagið hevði gjørt fólk løt og ófræls. Staturin skuldi ikki longur býta samfelagsins ágóða so javnt sum gjørligt millum fólk, men fólk skuldu taka sær av sær sjálvum og eisini syrgja fyri at útvega sær arbeiði. Tað varð hildið gott at vera sjálvsøkin.

Í USA setti Reagan strangari reglur í verk fyri tey, sum søktu almannahjálp, og rætturin til matkupongir og stuðulin til barnafamiljur vórðu skerd. Í Amerika átti staturin ongantíð stórvegis av vinnulívinum, og tí gjørdist høvuðstátturin í liberaliseringini hjá Reagan at minka almennu ávirkanina á búskapin. Tað var Jimmy Carter, sum byrjaði henda politikk í seinnu helvt av sjeytiárunum. Reagan tók príseftirlitið á olju av, linkaði avmarkingar fyri jarnbreytaflutningi, kringvørpini, olju- og gassídnaðin og var varin við at brúka kappingarlógir.

Amerikansku fakfeløgini høvdu ikki havt stórvegis at sagt í mong ár, men kortini valdi Reagan at fara líka harðliga fram sum Thatcher móti fakfeløgunum. Stutt eftir, at hann hevði tikið við sum forseti, fóru flogleiðarar í verkfall. Reagan gjørdi ikki mætari enn at geva øllum sekkin. Hernaðarligir flogleiðarar og nýlærdir fingu størvini.

Í 1981 gav Reagan stóran skattalætta, og skattalógin varð samstundis broytt, so at vinnulívið fekk nógvar møguleikar at sleppa bíliga í skatti. Nógvar stórar amerikanskar fyritøkur rindaðu ikki eitt oyra í skatti. Marginalskatturin lækkaði úr 70 niður í 28%.

Í Bretlandi seldi stjórnin statsognir fyri 67 miljardir pund í 80-unum og 90-unum. Tað almenna hevði átt tað mesta av kolinum, stálinum, gassinum, elveitingini, vatninum, jarnbreytunum, flogfeløgunum, telesamskiftinum, kjarnorkuni og skipasmiðjunum, og haraftrat átti staturin nógv í oljuni, bankunum, farmaflutninginum og flutningi eftir vegunum.

Thatcher lækkaði skattin bæði hjá vinnuni og borgarum, prís-, vinnings- og valutaeftirlitið varð tikið av. Fleiri 1000 fólk í Bank of England vórðu søgd upp. Eftirlitið við kringvørpum, flutningi og reklamu varð tikið av. Í 1979 vóru fýra ferðir so nógvir limir í fakfeløgunum sum partabrævaeigarar. Áðrenn 10 ár vóru farin, vóru hesir seinnu í meiriluta. Kapitalisman skuldi gerast "fólkslig", og øll, sum vóru ímóti, vórðu álopin. Fakfeløgini fingu skyldina av, at tað gekst ídnaðinum so illa.

### Nýggja kapitalisman fór um alln heim

Trúarorðini hjá angloamerikanska marknaðarbúskapinum vórðu skjótt breidd út um allan heim. Nýggj tøknifrøði innan samskifti og sjónvarp gjørdu sítt. Tað hevði alstóran týdning, at altjóða lánistovnar sum valutagrunnurin IMF og Heimsbankin stýðjaðu ta nýggju kapitalismuna, sum fór sum eldur úr Latínamerika til Asia, India, tað mesta av Afrika, frá gomlum kapitalistiskum londum í afturgongd, sum Bretland, til sterk kapitalistisk lond sum Týskland, ið annars hevði eina gamla siðvenju við almennum eftirliti. Og at enda til tey kommunistisku londini, sum høvdu havt planbúskap. Marknaðurin gjørdist loysunarorðið, so hvørt sum liberaliseraðir



*20-ára nýliberala eksperimentið, sum byrjaði í Westminster og Washington, hevur ikki gagnað okkum øllum. Tann tradisjonelli hátturin at máta búskaparligan vøkstur, so sum bruttotjóðarframleiðsla pr. íbúgva ella vøkstur í bruttotjóðarframleiðsluni, fjalir veruleikan. Tað er millum annað staðfestingin hjá Noreena Hertz. Tað er bók hennara, sum er grundarlag undir greinarøðini hjá Finnboga Ísakson*

statir kundu vísa á góð úrslit.

Tey fyrstu londini, sum fevndu anglo-amerikansku kapitalismuna, vóru tey, sum áður vóru undir bretskum harradømi, Australia og Kanada. Og vit í Føroyum, sum fingu Carragataálitið, hava eisini frætt um New Zealand, eitt av heimsins best útbygdu sosialdemokratium, sum gjørdist ein nýliberalur statur. Samfelagið varð radikalt nýskipað, og ongin av teimum mest týðandi sosialu stovnunum fekk frið. Hernaðarligu einaræðisharrarnir í Latínamerika í 80-árunum – sum Pinochet í Chile – og leiðararnir í Mexico, Argentina og Brasilia fóru somu kós. Teir ásannaðu, at hetta var treytin fyri at fáa lán frá IMF.

Høg inflasjón og stór skuld noyddi leiðarar í Evropa at seta spurnartekin við búskaparpolitikkin. Helmuth Kohl í Týsklandi og Chirac í Fraklandi vóru ikki fanatiskir høgramenn sum Thatcher og Reagan, men ásannaðu, at fíggjarligir fyrimunur vóru við privatisering. Kohl avmarkaði sosialar stuðulsskipanir og heilsutilboð, fyritøkur vórðu privatiseraðar, verkfalslógirnar broyttar til frama fyri arbeiðsgevararnar, og skatturin á vinnuni varð lækkaður. Í Italia og Fraklandi vórðu almennar fyritøkur privatiseraðar í 10 ára skeiðinum fram til 1995 fyri 50 miljardir dollarar.

Samstundis vóru dagarnir hjá kommunismuni – einasta rættiliga avbjóðaranum hjá kapitalismuni – taldir. Á heysti í 1988 helt Gorbatjov røðu í ST og segði, at kalda kríggið var av. Árið eftir fall Berlinmúrurin, og trý ár eftir taluna hoknaði Sovjetsamveldið saman.

Vilhjálmur Landtøkumaður tók Ongland við svørði, men tað vóru fjølmiðlarnir, sum bastu Sovjetsamveldinum. Tøknifrøðin gjørdi tað ómøguligt hjá Sovjetsamveldinum framhaldandi at forða fyri, at borgararnir fingu at vita um glæstritilveruna í Vesturheiminum. McDonalds, Levis, BMW og rocktónleikur gjørdust fyri eysturevropearar líka týðandi ímyndir av vesturlendskum lívsstíli sum fleirflokkaskipan, talu- og skrivifrælsi og frælsi at ferðast. Hernaðarútreiðslurnar beindu fyri sovjettiska búskapinum, og tað var púra vónleyst at hugsa um at gera eina skipan, sum kundi kappast við stjørnukrígsætlanina hjá Reagan.

Lond, sum høvdu havt sovjettisku kommunismuna sum fyrimynd, løgdu eisini um. Nevnast kunna India og afrikansku londini Zambia og Tanzania. Eisini Kina fekk marknaðarbúskap.

Lond, sum sóu framgongdina í asiatiskum tikarabúskapum sum Singapore, Hongkong, Taiwan og Suðurkorea, fóru nú at loyva útlendingum at gera beinleiðis íløgur. Tey sóu, at hesi lond og øki fingu almikið gagn av at gera loyvisavtalur og felags framtøk og fingu fyrimunir burtur úr kapitalinum og tøknifrøðini, sum tær útlendsku fyritøkurnar og íleggjararnir komu við.

### Lat-standa-til kapitalisman

Samstundis minkaðu tey ríku londini menningarhjálpina. Í 1992 vóru beinleiðis útlendskar íløgur í menningarlondunum fyri fyrstu ferð størri enn menningarhjálpin, og munurin er vaksin síðani. Í 1997 vóru íløgurnar 160 miljardir dollarar og menningarhjálpin 40 miljardir dollarar. Til sammetingar kann nevnast, at í 1990 var menningarhjálpin 60 miljardir dollarar og íløgurnar 20 miljardir dollarar. Í teimum ríku londunum ansaðu stjórnirnar nú væl eftir, at tær almennu útreiðslurnar skuldu ikki vera ov stórar, og tí skerdu tey menningarhjálpina heldur enn at skerja sínar egnu tænastur ov nógv.

Hugsjónin um ta nýliberalu lat-standa-til-kapitalismuna hjá Thatcher og Reagan var tann ráðandi í heiminum fyrst í nítitalinum, og eisini vinstrasinnaðir flokkar tóku hana til sín. Teir nýggju demokratarnir í USA við Bill Clinton á odda løgdu ikki so stóran dent á sosialt rættvísi, men á vinnulív, íløgur, kappingarevni og fríhandil. Teir vildu heldur geva

*Framhald á næstu síðu*